# Ein gipspláta er ikki bert ein

**Ofta koma bíligar gipsplátur á marknaðin. – Men tað er ikki vist, at tær eru so góðar fyri tað, sigur Sigurd Vatnhamar**

BYGGERI 2006
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Danogips:** – Eg veit ikki, um vit altíð hugsa um, hví vit byggja okkum hús. Men ein orsøk er í øllum førum eitt ynski um at skapa karmar fyri dagligum hugna, trivnaði, samveru, friði, tryggleika og privatlívi.

– Til tess at skapa røttu karmarnar er gips ein natúrligur partur. Hetta nøktar somuleiðis allan tørvin fyri nútíðar bygging!

Menninir í Danogips í Hobro duga at tosa fyri seg um fyrimunirnar við at nýta gipsplátur í heiminum. Tí hesi fyrimunir eru nógvir og rættiliga eyðsýndir eisini.

Umframt tað at gips verjir móti eldi, vindi og kulda og verjir fyri larmi, eru pláturnar léttar og kunnu lættliga broytast og tilpassast til skiftandi tørvin hjá familjunum.



*Gipsplátur kunnu bendast og boyggjast meiri enn ein heldur. Sigurd Vatnhamar, sum dagliga starvast sum lærari á Tekniska skúla skoðar her nakrar teirra*

## Menning

Hetta er alt vitan, sum starvsfólkini á verksmiðjuni hjá Danogips fegin vilja geva víðari til teir 84 føroyingarnar, sum hósdagin í farnu viku vóru savnaðir saman her.

Hetta var ein partur av skránni, sum ein av kundunum og stórur avtakari, Havnar Timburhandil hevði lagt fyri ferðina til størstu byggimessuna nakrantíð á danskari jørð.

Henda framsýningin skuldi sjálvandi vitjast, men ein vildi í sama andadrátti vísa føroyskum handverksmeistarum á nakrar nýggjar møguleikar og menning innan tilfar til bygging.

Millum teir 84 luttakararnar var Sigurd Vatnhamar, sum dagliga starvast sum lærari á Teknisk skúla.

Hann hevur eina ferð fyrr vitjað hesa verksmiðjuna. Men tað var framvegis áhugavert hjá honum at síggja alt aftur.

– Ein lærir altíð okkurt nýtt, sum hann tekur til.

## Hvat og hvussu

Sigurd lærdi í síni tíð til húsasmið, og hevur tí, sum ein part av hesum, fingið innlit í hvussu byggitilfarið er uppbygt.

Henda áhugan hevur hann framvegis, nú hann stendur sum undirvísari framman fyri teimum sum nú eru í somu læru sum hann á sinni.

Á vitjanini hjá Danogips í Hobro fekk hann tí eisini nógv nýtt at vita um, hvussu gips úr jørðini verður til eina gipsplátu, sum at enda verður fest á eitt loft ella á eitt gólv í Føroyum, Danmark og aðrastaðni úti í heimi.

– Tað hevur verið sera áhugavert at sæð, hvussu framleiðslan er.

– Tú stendur jú við eini

Størv hjá FT Net

**Verkfrøðingur til Radiodeildina**
Rakstrar- og menningararbeiði innan radiosamskifti

**Starvsfólk til Radiodeildina**
Rakstrar- og útbyggingararbeiði innan radiosamskifti

**Starvsfólk til Transmissióndeildina**
Rakstrar- og verkætlanararbeiði til nýggjar tænastur

**Byggifrøðingur til Byggideildina**
Rakstrar- og viðlíkahaldsarbeiði av bygningum

ft•net

*Meira fæst at vita um størvini á www.ftnet.fo*

FT Net er dótturfelag hjá Føroya Tele. FT Net rekur fjarskiftisnetið hjá Føroya Tele, sum fevnir um kaðalnetið, luftborna netið, transmissión og bygningar. Endamálið er at tryggja øllum veitarum somu atgongd til netið. FT Net hevur sett sær fyri at geva samskiftismøguleikar á hægsta dygdarstigi, so øll í Føroyum kunnu luttaka í altjóða samfelagnum. Umleið 70 fólk starvast hjá FT Neti.